Almanna- og Heilsumálaráðið Tórshavn 9. februar 2026

Hoyringsskriv til uppskot til løgtingslóg um leigustuðul
Heilsuhjálparafelag Føroya takkar fyri møguleikan at koma við viðmerkingum til uppskot til løgtingslóg um leigustuðul.
Uppskotið hevur serliga týdning fyri okkara limir. Nógvir heilsuhjálparar eru millum tey lágløntu í samfelagnum, og ein stórur partur arbeiðir niðursetta tíð, til dømis 0,7 ella minni. Tí eru treytirnar fyri leigustuðli, inntøkumørkum, somuleiðis sum viðurskiftini kring umsókn og viðgerð, av stórum týdningi fyri støðuna hjá okkara limum.
Nakað annað, ið hendan lógin kann ávirka, er møguleikin fyri, at einsamallir persónar og familjur, ið eru láglønt, hava størri møguleika fyri, at klára seg fíggjarliga.
Felagið metir, at tað er rímiligt, at tey, ið leiga fáa leigustuðul. Hendan skipanin minnir um tað ein eitt nú sær í Danmark við " boligstøtte".

Viðmerkingar til ávísar ásetingar í uppskotinum

Vísandi til §1
Vit taka undir við endamálinum um at bøta um bústaðarstøðuna hjá húskjum við lágum og miðalinntøkum. Um vit hyggja eftir leigukostnaðinum, eitt nú í Tórshavn, eru teir rættiliga høgir, og tí er hetta uppskotið við til at skapa javnari treytir fyri tey, ið búgva í leigubústøðum.
Fyri okkara limir, sum ofta hava lága inntøku, er hetta eitt sera viðkomandi og neyðugt endamál, ið er við til at geva teimum størri fíggjarligt rásarúm.

Vísandi til §2
Vit vilja vísa á týdningin av, at virkisøkið fevnir nóg breitt til eisini at umfata starvsfólk, sum eru í føstum starvi, men hava lága samlaða inntøku orsakað av niðursettari arbeiðstíð.
Vit meta, at tað er í lagi, at ein ikki kann fáa leigustuðul, um ein leigar bústað, ið er fevndur av kapitli 6 í almannalógini.

Vísandi til §3
Niðursett arbeiðstíð hjá nógvum heilsuhjálparum, er ein beinleiðis fylgja av bæði farligum og tungum arbeiði, skiftandi arbeiðstíðum og mangli á føstum størvum í økinum. Hetta er ikki eitt sjálvvalt val. Tað eigur at verða tikið við í ásetingini av inntøkumørkum fyri leigustuðul. Og tí taka vit undir við, at leigustuðulin er inntøkugrundaður.

Vísandi til §4
Vit vilja vísa á, at útrokning sambært føstum reglum kann vera ein fyrimunur. Tað er tó týdningarmikið, at skipanin er gjøgnumskygd og lætt at skilja, so borgarin veit, hvussu stuðulin verður roknaður.

Vísandi til §5
Vit meta, at viðurskiftini kring umsókn og viðgerð, eiga at vera so einføld og greið sum gjørligt. Okkara royndir vísa, at fløkt krøv til dokumentatión ofta raka tey, sum hava størstan tørv á stuðli.
Felagið tekur undir við, at mann skal kunna hava heimabúgvandi børn yngri enn 23 ár, uttan at teirra inntøka skal kunna roknast upp í útrokningargrundaralgið hjá familjuni.

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo

Vísandi til §6
Vit vilja vísa á týdningin av, at leigustuðulin virkar saman við øðrum almannaveitingum, uttan at skapa óhepnar mótrokningar ella støður, har fólk í praksis standa verri enn áður.

Vísandi til §13
Vit meta, at tað er umráðandi, at skipanin er fult virkin frá gildiskomudegnum, og at borgarar fáa greiða kunning í góðari tíð um, hvussu søkjast kann og hvat krevst.

Samandráttur.
Sum heild meta vit, at uppskotið til løgtingslóg um leigustuðul er eitt jaligt stig.
Samstundis vilja vit áhaldandi vísa á týdningin av:

- at taka serligt atlit til láglønt arbeiðsfólk
- at tryggja rættindi hjá teimum, sum arbeiða niðursetta tíð
- og at gera skipanina greiða og atkomuliga

Heilsuhjálparafelag Føroya

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo